VIÐMERKINGAR

# En strid om oplysninger?

**Jørn Astrup Hansen, Bestyrelsesformand for P/F Elektron**



Under overskriften Eitt stríð um upplýsingar gjorde Ingi Rasmussen i en artikel i Sosialurin den 30. november 2002 status over den uro, der er opstået om GjaldSkipan - et betalingsformidlingssystem, som Elektron tilbyder i samarbejde med Pengeinstitutternes BetalingsSystemer (PBS).

Efter pengeinstitutternes - og Elektrons - bedste opfattelse er det ikke en strid om personoplysninger. Pengeinstitutterne har ganske den samme interesse som myndighederne i at værne om oplysninger om den enkelte borger. Striden drejer sig om almindelige retssikkerhedsprincipper. Og den drejer sig om de arbejdsbetingelser, som P/F Elektron virker under.

## GjaldSkipan

P/F Elektron fik i juni 2002 af Datatilsynet, der af lagtinget er indsat i loven som øverste myndighed på området, tilladelse til at tage GjaldSkipan i anvendelse. Alligevel måtte Elektron og pengeinstitutterne efterfølgende opleve at høre landsstyremanden i lovanliggender underkende Datatilsynet. Efter landsstyremandens opfattelse er Datatilsynets afgørelse ikke i overensstemmelse med lagtingets vilje, og landsstyremanden erklærede, at han med en ny bekendtgørelse ville omgøre Datatilsynets afgørelse.

Nu er der gået et halvt år, og intet er hændt. Der er ikke kommet en ny bekendtgørelse, Datatilsynet har ikke taget skridt til at trække tilladelsen til Elektron tilbage, landsstyremanden har ikke lagt et nyt lovforslag for lagtinget, og der er - mig bekendt - ikke indgivet politianmeldelse mod hverken Elektron eller pengeinstitutterne. Men landsstyremanden fastholder fortsat, at han vil standse GjaldSkipan!

Det er naturligvis en ganske uholdbar situation for Elektron og for pengeinstitutterne. For pengeinstitutter som for Palleba må der gælde almindelige retssikkerhedsprincipper. Pengeinstitutterne er ikke nogen trussel mod demokratiet, og pengeinstitutterne er ikke i færd med at gøre sig til en femte statsmagt, som landsstyremanden antyder. Men pengeinstitutterne, der her er kommet i klemme mellem forvaltningen og lagtinget, må kunne gøre opmærksom på forholdet uden at blive kaldt for samfundsomstyrtere. Pengeinstitutterne har dog over for deres mange kunder, der dagligt anvender pengeinstitutternes systemer, en forpligtelse til at sørge for, at alt går lovligt til.

## Lex Elektron

Ved fusionen i april 1994 af Føroya Banki og Sjóvinnubankin så lagtinget en risiko for, at den fusionerede bank skulle vælge at betjene sig af en udenlandsk datacentral. (Den ene af bankerne anvendte ved fusionen BEC i Roskilde). Med lov om private registre afskar lagtinget i maj 1994 effektivt banken fra at fortsætte samarbejdet med BEC. Det var et ganske drastisk lovindgreb, som måtte ses på baggrund af, at Færøerne i 1994 befandt sig i noget, der liggende en undtagelsestilstand.

Siden 1995 har de færøske pengeinstitutter herefter i alt væsentligt anvendt Elektron til deres daglige EDB-opgaver. Men Elektron har hele tiden haft et vist samarbejde med udenlandske datavirksomheder - og navnlig med PBS, som de færøske pengeinstitutter siden 1971 har været medejere af. Forholdet har på intet tidspunkt givet anledning til problemer med myndighederne. Før nu, altså.

Hensigten med lov om private registre var at sikre, at de færøske pengeinstitutter ikke flyttede deres daglige EDB-opgaver ud af landet og dermed fjernede grundlaget under Elektron. Hensigten var ikke at afskære Elektron fra et hensigtsmæssigt samarbejde med andre datavirksomheder. Heller ikke selv om det måtte indebære, at personoplysninger bevægede sig hen over grænserne.

## Mangel på konsekvens

En nidkær fortolkning af lov om behandling af personoplysninger som den, landsstyremanden har lagt for dagen i balladen om GjaldSkipan, vil effektivt afskære Elektron fra at samarbejde med udlandet. Med lovens meget vidtgående definition af begrebet personoplysninger kan der reelt ikke samarbejdes med f.eks. danske datacentraler. Ethvert relevant samarbejde baseret på forretningsmæssige principper vil - i et eller andet omfang - indebære udveksling af det, loven definerer som personoplysninger.

Ganske overraskende har landsstyremanden imidlertid oplyst, at medens han agter at standse GjaldSkipan, så kan FR-kortet få lov til at fortsætte. FR-kortet, der udbydes af de færøske pengeinstitutter i samarbejde med PBS, er ligesom GjaldSkipan et betalingsformidlingssystem, men FR-kortet forudsætter rigtignok en langt mere vidtgående udveksling af personoplysninger end GjaldSkipan.

## Forskelsbehandling af Elektron?

Af debatten kan man få det indtryk, at nok drejer lagtingslov nr. 31 af 8. maj 2001 sig om personoplysninger. Men den drejer sig også - og måske snarere - om Elektron.

I Elektron vil vi nødigt tro, at vi er udsat for forskelsbehandling. Men vi kan da nok undre os over den varme velkomst, som GjaldSkipan har fået. Under navnet BetalingsService har danske kreditorer og PBS i herrens mange år tilbudt systemet gennem de færøske pengeinstitutter. Masser af færinger har lige så længe anvendt BetalingsService, uden at nogen synes at være kommet til skade ved det. GjaldSkipan indebærer, at færøske pengeinstitutkunder nu kan se frem til at betale til færøske og danske kreditorer gennem det samme system, og at betalingsformidlingen nu tilbydes i færøsk regie.

Oplevelsen af forskelsbehandling næres af, at landsstyret, som senere på måneden udbyder et obligationslån på Færøerne, har til hensigt at registrere obligationskøberne hos en dansk datacentral. Og oplevelsen næres af, at Virðisbrævamarknaður Føroya tidligere i år angiveligt har fået tilladelse til at søge etableret et færøsk værdipapirmarked, som forudsætter, at ejerskabet til færøske erhvervsvirksomheder, der lader sig børsnotere (på Island), skal registreres i Værdipapircentralen. I Tåstrup!

## Ikke hvor - men hvordan

Elektron ønsker lighed for loven. Og så kunne vi ønske os en fordomsfri og pragmatisk administration af § 16 i lov om behandling af personoplysninger, hvorefter personoplysninger som hovedregel skal opbevares og behandles på Færøerne. Det afgørende bør være, at der er sikkerhed for, at enhver behandling af personoplysninger finder sted på fuldt betryggende vis. Derimod bør det ikke være afgørende, at enhver behandling finder sted på Færøerne. Vi bør på Færøerne - når det kan ske på forsvarlig vis - kunne deltage i et internationalt samarbejde.

ítróttur

Nr. 232 • hósdagur • 03. desember 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Grundspælið á vegamóti

**Nú liðini í bestu kvinnu- og mansdeildunum hava spælt ávikavist átta, níggju ella tíggju dystir, ber til at ímynda sær, hvussu vorðið verður, tá endaspælið fer í gongd í januar**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*



*Nú VB endiliga snávaði í oddastriðnum hjá kvinnunum, fingu tær kortini eina hjálpandi hond, tá Kyndil bremsaði annars væl koyrandi VÍF*

Hóast stigatalvurnar nú kunnu vísa, at rímiliga stórur munur er á fleiri av liðunum, so kann hetta broytast so skjótt.

Um ikki annað, so tá grundspælið er liðugt, tí tá verða øll stigini koyrd niður í helvt, og so byrja liðini næstan av nýggjum í endaspælinum.

Serliga kemur hetta kanska væl við hjá teimum liðunum, ið ikki liggja so ovarlaga, tí tá verður munurin upp til fremru liðini heldur minni.

Men eisini millum tey fremstu liðini eru kappingin øgilig um at hava ein fyrimun, tá farið verður undir endaspælið.

At hesin fyrimunur kanska ikki er so stórur tá, sum hann kann vera nú, hevur minni at siga, tí sálarliga yvirtakið, ið eitt ella tvey stig kunnu geva, viga nógv í metingini.

## Næstan øll sleppa upp í part

Um hugt verður at kappingini hjá kvinnunum, tykist størsti spurningurin at vera, um VB-kvinnurnar megna at halda tørn.

Eftir sjey sigrar á rað, taptu tær fyri fyrstu ferð um vikuskiftið, tá tær á útivølli møttu StÍF.

Framvegis er VB klárt á odda og hevur eisini spælt ein dyst minni enn nærmastu kappingarneytarnir, men eftir stendur at síggja, hvussu stórur skelkurin av fyrsta tapinum kann vera.

VÍF og StÍF eru saman við Stjørnuni tey liðini, ið liggja best fyri at taka kappingina upp við VB, men lopið niður til Kyndil og Neistan er heldur ikki størri enn so, at eisini tey kunnu blanda seg upp í oddastríðið.

Í grundini kunnu øll kvinnuliðini, uttan Tjaldur, sleppa upp í part, tá farið verður undir endaspælið hjá kvinnunum. Og tá velst í grundini bara um, hvussu góð byrjanin er í endaspælinum.

Við tí fyrivarni, at ikki øll hava spælt líka nógvar dystir, hevði ein hálverað stigatalva sæð soleiðis út nú: VB sjey stig, VÍF , StÍF og Stjørnan fimm stig, Kyndil og Neistin fýra stig og Tjaldur eitt stig.

## Stendur millum tvey og kanska trý lið

Hjá monnunum er StÍF oddalið við trimum stigum fleiri enn VÍF og fýra fleiri enn Neistin.

Hetta er ikki so øgiliga nógv, men er kortini ein góður fyrimunur hjá strandingum, nú endaspælið nærkast.

At teir hava tikið stig frá vestmenningum í báðum uppgerðunum teirra millum, skuldi givið StÍF stórt sjálvsálit, nú kappingin skjótt er hálvrunnin.

Men hóast VÍF kann tykjast eitt sindur smokkað niður ímillum, er tað ein sannroynd, at tú ongantíð skalt avskriva liðið úr Vestmanna, ið fyrr hevur roynt at verið afturúrsiglt í grundspælinum, men síðani er komið sterkt aftur í endaspælinum.

Neistin liggur eisini framvið, men hevur kanska ikki ordiliga sama formatið, sum væntast kann av bæði StÍF og VÍF.

Men kennir Neistin sína vitjunartíð móti júst teimum betru og vísir støðug avrik móti lægru liðunum, kann Neistin saktans gerast »jokari« í endaspælinum.

Í løtuni sær hinvegin út, at Kyndil er mitt í rúgvuni og hvørki fer ein ella annan veg, meðan KÍF gongur leyst av botninum, har líkt er til, at tað verður bæði tungt og trupult hjá H71 og Tjaldri.

Hóast øll liðini ikki hava spælt líka nógvar dystir, hevði hálveraða stigatalvan hjá monnunum sæð soleiðis út: StÍF átta stig, VÍF sjey stig, Neistin seks stig, Kyndil fimm stig, KÍF fýra stig og H71 og Tjaldur tvey stig í part.

Her er við øðrum orðum ikki sum hjá kvinnunum, har næstan øll kunnu sleppa upp í part, men kortini er munurin ikki størri enn so, at tað so skjótt kann flyta seg millum liðini, tá endaspælið byrjar.

# Grønlendskur landsliðshondbóltur fer undir samstarv við danskt felag

**Fyri at tryggja menningina hjá ungu og evnaríku grønlendsku hondbóltsspælarunum, hevur grønlendska hondbóltssambandið GHF gjørt samstarvsavtalu við danska felagið Ikast/Bording FH**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Ásannandi, at tað er rættiliga avmarkað, hvussu nógv ungir og evnaríkir hondbóltsspælarar kunnu mennast í Grønlandi, er grønlendska hondbólts-sambandið GHF nú farið nýggjar leiðir.

Í farnu viku skrivaðu GHF og danska hondbóltsfelagið Ikast/Bording FH undir eina samstarvsavtalu, ið er galdandi til 1. juni 2005.

Sambært hesa avtalu fær danska felagið 550.000 krónur fyri at taka sær væl av ungum grønlendingum, ið duga at spæla hondbólt, so teir skulu gerast uppaftur dugnaligari.

Grønlendska handilsketan undir KNI, Pilersuisoq/Pisiffik, ið er høvuðsstuðul hjá GHF, rindar hesa gott og væl hálvu milliónina.

– Vit mugu ásanna, at grønlendsku spælarar mugu sleppa úr Grønlandi, skal menningin halda fram. Vit hoyra ofta, at tá okkara ungdómslið møta donskum liðum, eru tey á sama stigi, men so heldur menningin ikki fram á sama hátt, sigur Kurt Lauritsen, liðleiðari hjá grønlendska manslandsliðnum.

– Nú vóna vit, at nýggja samstarvsavtalan kann leggja menningina í eina fasta legu, so vit eisini kunnu hava eina ætlan fyri hvønn einstakan av spælarunum.

Óvist er, um føroyska hondbóltssambandið hevði gjørt eina líknandi avtalu, og tað eru kanska fyrst og fremst tvær orsøkir til tað.

Fyri tað fyrsta er ikki sama samband millum føroyskan og danskan hondbólt, sum millum grønlendskan og danskan hondbólt.

Og haraftrat finst neyvan nakar stuðul ella sponsorur á okkara leiðum, ið sær seg føran fyri at leggja yvir hálva millión á borðið, fyri at ungir føroyingar skulu mennast til betri hondbóltsspælarar.